HEIMSINS REINASTA TEMA OYGGJALAND

# Heimsins reinasta



## HESAFERÐ
### KLAKSVÍK

**12. partur**

Í dag koma vit við enn einum parti í røðini við misvísandi yvirskriftini »Heimsins reinasta oyggjaland«.

**Mikudagin vóru vit og Klaksvík, sum hesa vikuna er karmur um Summarfestivalin, og í dag halda vit fram í høvuðsstaðnum hjá norðoyingum, ið eins og nógv onnur pláss í Føroyum, hevur nógv órudd at bjóða uppá. Bert við at flyta seg eitt lítið sindur frá festivalplássinum, møta hesar sjónir gestunum. Við slíkum myndum kann vera torført hjá kommununi at fáa slagorðið »Reinur og fríur Klaksvíkar býur« at ganga upp í eina hægri eind.**

Í nógvar vikur hevur Sosialurin verið úti við myndatólinum og sett ljós á tær ovurhonds stóru mongdirnar av burturkasti, sum sløðist runt í okkara vøkru oyggjum. Bæði á bygd, í bý og úti í náttúrini.

Allar myndirnar eru tiknar ígjøgnum rútin á einum bili á alfara vegi, ella har koyrandi er. Gløgt er gestsins eyga, sigur orðatakið, og tað merkir, at alt burturkastið, sum sæst ígjøgnum myndatól okkara, sjálvandi eisini kann avmyndast av teimum ferðafólkum, sum vitja Føroyar. Tær fyrstu myndirnar vóru úr høvuðstaðarøkinum, har flestu ferðafólk koma upp á land ella seta kós ímóti, eftir at vera lend í Vágum. Í øðrum parti vóru vit í grannabygdunum fyri norðan, Kaldbak, Kaldbaksbotni og Sundi, sum allar hoyra til Tórshavnar kommunu, sum fyri kortum hevði umhvørvisviku, og í triðja parti stóðu bygdirnar vestan- og norðanfyri, Kirkjubø, Velbastaður, Syðradalur og Norðadalur, fyri skotum. Myndirnar í fjórða parti vóru av Signabø, úr Kollafirði, Hósvík, við Áir og úr Hvalvík, og í fimta parti Saksunardali og Saksun. Sætti partur var úr Nesvík, av Langasandi og úr Haldórsvík, men ikki úr Tjørnuvík. Har var nevniliga onki at seta fingur á. Síðani vóru vit á Oyri, ið hevði so nógv órudd at bjóða uppá, at bygdin fekk alla opnuna. Í 8. parti høvdu vit myndir av Oyrabakka, frá Norðskála og úr Svínáum, sum eisini hoyra til Sunda kommunu. Næstseinast vóru vit í teimum tveimum bygdunum í Eiðis kommunu, Ljósá og Eiði, og seinast otaðu vit okkum til norðastu bygd í Sunda kommunu, Gjógv og yvir um til Funning, sum frá 1. januar fer upp í Runavíkar kommunu.

Føroyar skal vera ferðamannaland, er vakra endamálið hjá bæði politikarum og myndugleikum, sum arbeiða við ferðavinnu. Í fjør kom stóra herðaklappið frá háttvirda tíðarritinum, National Geografic Traveler, sum setti Føroyar á eitt fyrstapláss av 111 oyggjalondum, tá tað snýr seg um at hava reint umhvørvi. Men liva vit upp til hetta? Og hvønn mátistokk hava tey fólkini brúkt, ið hava útnevnt oyggjar okkara til henda fornemma heiður? Um tey yvirhøvur hava verið her og hugt upp á umstøðurnar, so er ivaleyst gjørt skjótt


























